# Aðalfundir hjá feløgum í Vinnuhúsinum

**Í farnu viku høvdu trý feløg í Vinnuhúsinum aðalfund: Hand-verks-meistarafelagið, Reklamu-felagið og Prentsmiðjufelagið**

VINNULÍV

Mikudagin 5. apríl hevði Føroya Handverksmeistarafelag aðalfund í Vinnuhúsinum. Í nevndini sótu Magnus Magnussen, formaður, Jón Eliasen, næstformaður, Jón Danielsen, Eydna S. Mikkelsen, Anskar Hansen og Gudmund Jacobsen. Á aðalfundinum stóðu Anskar Hansen og Gudmund Jacobsen fyri vali, og báðir vóru afturvaldir. Nevndin skipar seg á fyrst komandi nevndarfundi.

### Poul formaður í Reklamufelagnum

Reklamufelagið hevði aðalfund hósdagin 6. apríl á Hotel Hafnia. Í fráfarandi nevnd sótu Høgni Rasmussen, Poul Clementsen og Erling Eidesgaard.

Teir báðir fyrru halda fram í nevndini, men Dánjal Samuelsen varð valdur í nevndina fyri Erling Eidesgaard. Nevndin skipaði seg beint eftir aðalfundin, soleiðis at Poul Clementsen verður formaður og Høgni Rasmussen verður næstformaður.

### Føroya Prentsmiðjufelag

Føroya Prentsmiðjufelag hevði hósdagin 6. apríl aðalfund í Vinnuhúsinum. Nevndin varð øll afturvald og skipaði seg beint eftir aðalfundin við Jón Hestoy sum formanni og Kristoffur Laksá sum næstformanni. Hinir limirnir eru Hjalgrím Samuelsen, Eyðun Húsgarð og Sóleyð Lind.



*Høgni Rasmussen, nevndarlimur og Poul Clementsen, formaður í Reklamufelagnum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Prentsmiðju-felagið limur í Føroya Arbeiðs-gevarafelag

VINNULÍV

Á aðalfundi 6. apríl avgjørdi Føroya Prentsmiðjufelag at melda seg inn í Føroya Arbeiðsgevarafelag við gildi frá 1. januar 2006.

Felagið hevur longu skrivstovu í Vinnuhúsinum, men nú er avgerð tikin um at melda seg inn í Føroya Arbeiðsgevarafelag sum lim. Hetta fer millum annað at merkja, at Føroya Arbeiðsgevarafelag fer at hava ábyrgdina av sáttmálasamráðingum vegna Føroya Prentsmiðjufelag.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag





# Atlantic Petroleum gjørt sáttmála um framleiðsluskip

MARKNAÐARRÁK

Atlantic Petroleum kunngjørdu í farnu viku saman við hinum eigarunum av Ettrick oljuleiðini, at ein 5 ára sáttmáli nú er gjørdur við Bluewater, um leigu og rakstur av einum framleiðsluskipi; sokallaðum FSPO. Hetta merkir, at fyrsta oljan úr Ettrick, størstu oljuleiðini hjá Atlantic Petroleum, væntandi fer at renna í byrjanini av 2008. Hetta er í tráð við áður fráboðaðu ætlanirnar, men eitt til tvey ár undan upprunaætlanini frá 2003.

Kursurin á partabrævinum hækkaði við góð 3% úr 619 til 640 dagin eftir kunngerðina, tí Ettrick-verkætlanin nú kom eitt týðandi stig nærri framleiðslu. Hóvast kunngerðina var ikki stórur handil í partabrævinum. Tveir teir fyrstu dagarnar fóru 15 handlar ígjøgnum, við einum samlaðum umsetningin uppá 1.039.834 DKK. Hetta samsvarar við umsetningin á Atlantic Petroleum partabrævinum ein vanligan handilsdag.

Seinni í ár borar felagið ein leitibrunn í føroyskum øki. Úrslitið frá hesi boringini og úrslitið frá "tight hole" avmarkingarbrunninum á West Lennox oljuleiðini, ið væntandi verða kunngjørdar í heyst, kunnu fara at ávirka partabrævakursin á felagnum.

Renturnar hækkaðar aftur

Hesa farnu vikuna helt rentuhækkingin fram. Danska 10-ára rentan hækkaði 0,08% til 3,97%. Sostatt eru lánsbrævarenturnar hækkaðar um 0,80% higartil í ár, at kalla út í eitt. Sannlíkindini fyri eini lítlari mótrørðslu niðureftir eru økt.

### Hesa vikuna

Páskavikan er stutt á marknaðunum um okkara leiðir, og í næstu viku kemur lítið av lyklatølum at handla út frá. Prísvakstrartøl úr USA hava týdning fyri lánsbrøv, men marknaðirnir fara væntandi at leggja dent á oljuprísin og komandi roknskapirnar.

Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 616,16 | 0,2% | ↑ |
| JPY | 5,21 | -0,3% | ↓ |
| GBP | 1.073,81 | 0,4% | ↑ |
| NOK | 95,13 | 0,4% | ↑ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 100,61 | 0,0% | → |
| Evru Lánsbrøv | 167,93 | -0,7% | ↓ |
| Norrøn Partabrøv | 120,29 | 0,2% | ↑ |
| Altjóða Vøkstur | 75,01 | 1,2% | ↑ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*